# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*"Ferðslutrygd er eitt øki, ið vit ikki hava ráð at slaka uppá, og tískil eigur eitt anlegg ikki at stranda uppá manglandi fígging"*
*Annika Olsen landsstýriskvinna í innlendismálum við heimasíðuna www.koyrilararin.fo*



*Benny Ejdesgaard við húsanum og DVD-fløgunum »Koyrikort - teori við garanti«. Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 17.10 er prát við Benny um nýggju fløguna*

## Teori við garanti

Koyrilærarin v/Benny Ejdesgaard er komin á marknaðin við tveimum DVD-fløgum við heitinum »Koyrikort - teori við garanti«.

Talan er um tvær fløgur í einum húsa við tilsamans fimm pørtum. Fløgurnar eru lisnar inn á føroyskum við bæði vanligum ferðslumyndum og 3-dimensionellum myndum, eins og eini gjøgnumgongd og frágreiðingum um tær vanligastu teoriroyndirnar, sum koma fyri á Akstovuni.

Fløgurnar, sum kosta tilsamans kr. 395.00, fáast í bókasølum og øðrum sølubúðum ella við at venda sær til Koyrilærarin v/ Benny Ejdesgaard á tel. 737475.

**mg**

# Koyriteknisk breyt í Føroyum



*Modell av hálkubreyt , ið stendur á Akstovuni í Havn*



**Í mong ár hevur verið tosað um, at tørvur er á einum koyriteknsikum anleggi við hálkubreyt í Føroyum. Landsstýriskvinnan í innlendismálum, Annika Olsen, sigur, at eitt tílíkt anlegg ikki eigur at stranda upp á manglandi fígging**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Landsstýriskvinnan í innlendismálum, Annika Olsen, sigur við heimasíðuna koyrilararin.fo, at ferðslutrygd er eitt øki, ið vit ikki hava ráð at slaka uppá, og tískil eigur eitt anlegg ikki at stranda upp á manglandi fígging.

Í samgonguskjalinum hjá landsstýrinum stendur m.a. um ferðslutrygd: "Arbeiðið at skapa trygg ferðsluviðurskifti heldur fram. Fyrireikingar verða gjørdar til at gera hálkubreyt. Dentur verður lagdur á at minka um ferðsluvanlukkur og miðað verður ímóti, at eingin letur lív í ferðsluni".

Spurd um eitt koyriteknisk anlegg er ávegis, sigur Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, at samfelagið avgjørt hevur tørv á einum slíkum anleggi. Tað stendur í samgonguskjalinum, at eitt tílíkt anlegg skal gerast, og at tey arbeiða við málinum. Eingin kostnaðarmeting er gjørd av ætlaninum, og hvar eitt tílíkt anlegg skal liggja. Tað er eitt av málunum, sum ein komandi arbeiðsbólkur skal arbeiða við. Annika Olsen sigur, at ein arbeiðsbólkur skal mannast av fólkum, sum umboða ymiskar bólkar, ið hava við málsøkið at gera, her ímillum umboð fyri koyrilærararnar.

Í nýggju koyrifrálæruni stendur, at øll sum skulu ogna sær eitt koyrikort skulu teir fyrstu tímarnar gjøgnumføra verkligu koyringina í einum sokallaðum "grulvigarði" sum er eitt inngirt øki. Í hesum sambandi sigur Annika Olsen, at eitt hugskot er at leggja grulvigarðin saman við koyritekniska anlegginum. Hon kundi ikki siga nakað um at ein slík ætlan verður veruleiki, einans at ein arbeiðsbólkur skal setast um heilt stutta tíð.

## Skoda 440 í Vágsbotni

Hesin Skoda bilurin stóð í vikuni parkeraður í Vágsbotni. Talan er um ein Skoda 440, sum er skrásettur í heimlandinum hjá Skoda, Kekkia. Skoda 440 vórðu gjørdir frá 1955-1958, tá bilurin í 1959 skifti navn til Skoda Octavia.







*Skoda 440 við eykahjóli á viðførisstativinum og flaggi á takinum og einari gulari tokulykt framman*
*Myndir: Magnus Gunnarsson*